# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

### GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

### 2003

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2003 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á Løgtingsskrivstovuni, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Leivur Harryson og Løgtingsins umboðsmanni, Joen H. Andreassen, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av fíggjarliga virksemi løgtingsins fyri 2003.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrar-roknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri uppsetingina av rakstrarroknskapinum. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um skjøl eru ávíst og váttað av rætta viðkomandi, rætt bókað og annars hoyra stovninum til. Vit hava ikki viðmerkingar viðv. gjøgnumgongd okkara av kostnaðarskjølum.

Grannskoðanin av ársroknskapinum umfatar m.a. eina kanning av upphæddunum í rakstrarroknskapinum, íroknað eina samanbering við undanfarin ár og givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fyri 2003 og fram til 20. oktober 2004. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Lønir v.m.**
Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2003. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn,

Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðv. fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 1998 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Reglurnar í hesum rundskrivum verða í høvuðsheitum fylgdar, men tað kemur fyri, at serliga uttanfyri Danmark ikki ber til at fáa innivist fyri ásetta takstin. Eisini kann viðmerkjast, at verður tingmaður bjóðaður uttanlands saman við hjúnafelag, fær hjúnarfelagin dagpening og endurgjald á jøvnum føti við tingmannin.

Staðfest er, at í einstøkum førum verða ferða- uppgerðir ikki gjørdar upp skjótast møguligt eftir heimkomu.

Viðv. ferðaforskotum, er í 2003 ein eldri ágóði uppá kr. 3.616, avskrivaður sum mistur. Løgtingsskrivstovan hevur mett, at ongir møguleikar eru fyri at innheinta upphæddina.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**
Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Grannskoðanin hevur í frágreiðingum okkara fyri undanfarin ár víst á, at av misgáum hevur vaskifólk á Løgtingsskrivstovuni fingið útgoldið góðar 11 t.kr. ov nógv í løn. Viðkomandi er ikki í starvi á stovninum longur. Tað hevur verið úrslitaleyst at innheinta peningin, og tískil er upphæddin avskrivað sum mist í 2003.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**
Stuðulin verður goldin, sambært Flokssskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 70 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 40 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini verður roknskapurin í hesum sambandi grannskoðaður av grannskoðara tingsins.

Stuðulin verður umsitin av Løgtingsskrivstovuni, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina fyri, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Skjølini vórðu góðkend og ávíst av Løgtingsskrivstovuni og váttað av ábyrgdarpersóni fyri viðkomandi tingbólk.

Grannskoðan okkara hevur staðfest, at ábyrgdarpersónar eru tilnevndir, og at flokkarnir hava gjørt ognaryvirlit, sambært reglugerðina.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| **T.kr./flokkur** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **F** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingið | 7 | 8 | 7 | 1 | 8 | 1 | 32 |
| Grundupphædd §1 | 70 | 70 | 70 | 70 | 70 | 70 | 420 |
| Tingmannaupphædd §2 | 242 | 283 | 242 | 0 | 283 | 0 | 1.050 |
| Stuðul tilsamans | 312 | 353 | 312 | 70 | 353 | 70 | 1.470 |
| Nýtsla 2003 | 311 | 308 | 310 | 71 | 248 | 66 | 1.313 |
| Meir/Minninýtsla | -2 | -45 | -2 | 1 | -105 | -4 | -158 |
| Lønir | 252 | 238 | 253 | 53 | 138 | 64 | 998 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum talvan vísir, er talan um minninýtslu samanlagt, men ikki fyri hvørja tingmanning sær. Samanlagt fyri allar flokkarnar er tó ein minninýtsla á 158 t.kr. Treytin um, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir er ikki lokin viðv. Tjóðveldisflokkinum. Verður roknað í mun til avhildnan kostnað, lýkur flokkurin kravið.

Spurningurin er um ásetingin um, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni, hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2002 lúka allir flokkar hesa áseting, einsæris og samanlagt.

Vit vilja enn einaferð heita á formansskapin um at taka støðu til, um roknskaparligu upphæddirnar fyri hvørja tingmanning sær eiga at verða váttaðar av ábyrgdarhavandi, tá roknskaparskeiðið er lokið.

**Bygging**
Í 2000 fór virksemið av álvara í gongd við at umbyggja Løgtingshúsið. Í frágreiðingum okkara fyri 2000, 2001 og 2002 mæltu vit til, at byggiroknskapur verður uppsettur, soleiðis at formansskapurin ávegis kann fylgja við, um kostnaðurin heldur samanborið við løgdu ætlanirnar.

Landsverk hevur sett upp ein byggiroknskap fyri tíðarskeiðið 2000 – 2003, og fevnir hesin um 1.- og 2. byggistig. Uppsetti byggiroknskapurin vísir byggikostnað higartil, men vísir ikki nýtslu samanborið við tillutaða játtan viðv. sundurlutaðum arbeiðum. Nýtslan tilsamans til løgtingshúsið er, sambært byggirokn-skapinum frá Landsverk, uppá 47,9 mió.kr. Vit hava ikki serskilt grannskoðað byggiroknskapin frá Landsverki.

**Setanarskriv hjá Tinglimum**
Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Undanfarin ár hevur verið víst á, at viðurskiftini hjá Jenisi av Rana og Marjusi Dam, ikki vóru komin í rættlag. Støðan er óheppin, tí viðkomandi hava ikki lokið treytirnar í lóggávuni í meira enn 4 ár. Í 2004 er staðfest, at viðurskiftini hjá Jenisi av Rana nú eru komin í rættlag í samsvari við reglurnar.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men hinvegin vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

Heitt verður enn einaferð á formansskapin, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag sum skjótast.

**Góðkenning av roknskapi**
Í frágreiðing okkara undanfarin ár er heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina, Løgtingsskrivstovuna og Løgtingsins Umboðsmann. Arbeitt hevur verið við málinum, tó uttan at avgreiða hetta. Heitt verður á formansskapin um at taka støðu til, um váttanarmannagongd skal setast í verk.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2003**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2003.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2003.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2003. Upphæddirnar fyri 2002 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr.<br>2003 | t.kr.<br>Játtan | t.kr.<br>2002 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | | 2.383 | 2.430 | 3.381 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 15.408 | 16.187 | 15.153 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.313 | 1.470 | 1.278 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 500 | 309 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 5.706 | 6.010 | 5.362 |
| Løgtingsarbeiði tilsamans | A | 22.427 | 24.167 | 22.103 |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | | 11.567 | 14.000 | 21.561 |
| | | **36.377** | **40.597** | **47.044** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 4.427 | 4.528 | 3.860 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 1.749 | 2.200 | 1.717 |
| | | **6.175** | **6.728** | **5.577** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **42.553** | **47.325** | **52.621** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2002. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Hinvegin kunnu frávik verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**

Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2003, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum. Kostnaðurin er samanlagt 42,6 mió.kr., meðan játtanin er uppá 47,3 mió.kr. Kostnaðirnir eru lækkaðir samanlagt við 10,1 mió.kr. í mun til 2002. Høvuðsorsøkin til hetta er, at nýtslan í sambandi við nýggjan bygning til Føroya Løgting er 10 mió.kr. lægri í 2002 í mun til í 2003.

**Løgtingsmenn**

Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2002 og í mun til ætlanina fyri 2003 (t.kr.):

| | 2003 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2002 | Munur 2002-03 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 12.200 | 12.377 | -177 | 11.855 | 345 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 1.777 | 1.900 | -123 | 1.757 | 20 |
| Tilskot til útlandið | 205 | 250 | -45 | 225 | -20 |
| Innanh. flytingar | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| | **15.492** | **16.187** | **-695** | **15.153** | **338** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum v.m. á 177 t.kr. og eina minninýtslu viðv. keyp av vørum og tænastum uppá 351 t.kr. Samanlagt er talan um eina minninýtslu í mun til játtan uppá 695 t.kr., meðan kostnaðurin er øktur 338 t.kr., samanborið við 2002.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2003 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2002 | Munur 2002-03 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 998 | 1.100 | -102 | 928 | 70 |
| Keyp av vørum og tænastum | 159 | 200 | -41 | 291 | -132 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 157 | 170 | -13 | 60 | 97 |
| | **1.313** | **1.470** | **-157** | **1.278** | **35** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 102 t.kr. Eisini er ein minninýtsla uppá 41 t.kr. viðv. keypi av vørum og tænastum. Samanlagt er talan um eina minninýtslu uppá 157 t.kr. í mun til játtan. Kostnaðurin er 35 t.kr. hægri í 2003 enn í 2002.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2002 og í mun til ætlan fyri 2003 (t.kr.):

| | 2003 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2002 | Munur 2002-03 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.974 | 4.380 | -406 | 3.738 | 236 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.352 | 1.450 | -98 | 1.192 | 160 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 111 | 90 | 21 | 20 | 91 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 256 | 100 | 156 | 417 | -162 |
| Avskrivingar | 11 | 0 | 11 | 0 | 11 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 7 | 0 | 7 | 4 | 3 |
| | **5.706** | **6.010** | **-304** | **5.362** | **344** |

Útgreiningin vísir, at kostnaðirnir eru 344 t.kr. hægri í 2003 enn í 2002. Størsta hækkingin er lønir v.m., ið eru øktar við 236 t.kr. Kostnaðurin til leigu og viðlíkhald er lækkaður við 162 t.kr. í mun til 2002. Samanlagt er talan um eina minninýtslu, samanborið við ætlanina uppá 304 t.kr.

Í skjali A, eru omanfyri standandi kostnaður nærri útgreinaður.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2002 og í mun til ætlan fyri 2003 (t.kr.):

| | 2003 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2002 | Munur 2002-03 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.198 | 3.613 | -415 | 2.937 | 261 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.025 | 507 | 518 | 565 | 461 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 13 | 140 | -127 | 118 | -105 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 190 | 266 | -76 | 195 | -5 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 2 | -2 | 2 | -2 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 0 | 0 | 0 | 42 | -42 |
| | **4.427** | **4.528** | **-101** | **3.860** | **567** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum - uppá 261 t.kr. í mun til 2002. Men í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 415 t.kr. á lønarøkinum. Kostnaðurin til keyp av vørum og tænastum er hækkaður við 461 t.kr. í mun til 2002 – og frávikið í mun til ætlan er uppá 518 t.kr. Samanlagt hevur stovnurin eina minninýtslu uppá 101 t.kr. í 2003. Kostnaðirnir eru hækkaðir við 567 t.kr. í mun til 2002.

Í skjali B, eru omanfyri standandi kostnaður nærri útgreinaður.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2002 og í mun til ætlan fyri 2003 (t.kr.):

| | 2003 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2002 | Munur 2002-03 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.368 | 1.400 | -32 | 1.278 | 90 |
| Keyp av vørum og tænastum | 316 | 700 | -384 | 335 | -19 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 8 | 0 | 8 | 48 | -41 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 56 | 100 | -44 | 56 | 0 |
| | **1.749** | **2.200** | **-451** | **1.718** | **31** |

Virksemið hjá stovninum byrjaði í mars mánaði 2001. Í mun til ætlanina er talan um eina minninnýtslu uppá 451 t.kr. Størsta minninýtslan er innan keyp av vørum og tænastum - minninýtslan er uppá 384 t.kr. Samanborið við 2002 eru kostnaðirnir øktir við 31 t.kr.

Í skjali C, er omanfyri standandi kostnaður nærri útgreinaður.

**Grannskoðaraváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, hin 6. januar 2005

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

Óli Joensen

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, hin ___ / ___ - 2005.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Edmund Joensen | Hergeir Nielsen | Vilhelm Johannesen | Óli Breckmann |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ

| **Løgtingsmenn** | **t.kr. 2003** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2002** |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 11.391 | | 10.582 |
| Tænstumenn | 380 | | 556 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 339 | | 469 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 159 | | 248 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -70 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **12.200** | **12.377** | **11.855** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 50 | | 14 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 842 | | 567 |
| Umboðan | 210 | | 244 |
| Matur og drykkjuvørur | 0 | | 8 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 14 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 1 | | 6 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 193 | | 474 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.309** | **1.660** | **1.315** |
| Húsaleiga | 0 | | 1 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **1** |
| Rakstraravskrivingar | 4 | | 0 |
| **Avskrivingar o.a.** | **4** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 1.777 | | 1.757 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **1.777** | **1.900** | **1.757** |
| Altjóða felagsskapir | 205 | | 225 |
| **Tilskot til útlandið** | **205** | **250** | **225** |
| Vørusøla til privat | -87 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-87** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn. | 1 | | 1 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **1** | **0** | **1** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **15.408** | **16.187** | **15.153** |

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 13 | | 1 |
| Tænastumenn | 46 | | 0 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 892 | | 861 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 13 | | 21 |
| Eftirlønir | 32 | | 45 |
| **Lønir v.m.** | **998** | **1.100** | **928** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 0 | | 5 |
| Umboðan | 0 | | 1 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 3 | | 3 |
| Keyp av vørum annars | 55 | | 98 |
| Telefon | 56 | | 68 |
| Postgjøld | 1 | | 1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 20 | | 24 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 25 | | 90 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **159** | **200** | **291** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 132 | | 6 |
| Skrivstovuútbúnaður | 0 | | 33 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 25 | | 20 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **157** | **170** | **60** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.313** | **1.470** | **1.278** |

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Keyp av tænastuveitingum annars | 0 | | 309 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **500** | **309** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **500** | **309** |

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 2.776 | | 2.603 |
| Tænastumenn | 586 | | 565 |
| Tímalønt | 285 | | 302 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 12 | | 9 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 49 | | 74 |
| Eftirlønir | 266 | | 262 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | 0 | | -78 |
| **Lønir v.m.** | **3.974** | **4.380** | **3.738** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 2 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 31 | | 56 |
| Umboðan | 22 | | 39 |
| Matur og drykkjuvørur | 0 | | 2 |
| Orkukeyp - el | 36 | | 105 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 80 | | 148 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 6 | | 19 |
| Keyp av vørum annars | 166 | | 130 |
| Telefon | 142 | | 139 |
| Postgjøld | 10 | | 13 |
| Trygging | 54 | | 34 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 272 | | 237 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 528 | | 270 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.352** | **1.450** | **1.192** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐIÐ - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 78 | | 20 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 33 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **111** | **90** | **20** |
| Húsaleiga | 191 | | 360 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 60 | | 57 |
| Skattur, avgjøld o.t. | 4 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **256** | **100** | **417** |
| Rakstraravskrivingar | 11 | | 0 |
| **Avskrivingar o.a.** | **11** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 7 | | 4 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **7** | **0** | **4** |
| Vørusøla til privat | -5 | | -10 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-5** | **-10** | **-10** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **5.706** | **6.010** | **5.362** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐIÐ TILSAMANS** | **22.427** | **24.167** | **22.103** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.912 | | 1.688 |
| Tænastumenn | 974 | | 939 |
| Tímalønt | 77 | | 78 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 8 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 38 | | 58 |
| Eftirlønir | 197 | | 167 |
| **Lønir v.m.** | **3.198** | **3.613** | **2.937** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 19 | | 38 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 130 | | 73 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 25 | | 3 |
| Umboðan | 19 | | 117 |
| Orkukeyp - el | 13 | | 14 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 10 | | 7 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 7 | | 9 |
| Keyp av vørum annars | 71 | | 62 |
| Telefon | 27 | | 30 |
| Postgjøld | 5 | | 5 |
| Trygging | 3 | | 5 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 45 | | 23 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 652 | | 178 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.025** | **507** | **565** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 12 | | 86 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 1 | | 32 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **13** | **140** | **118** |
| Húsaleiga | 190 | | 190 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 0 | | 4 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **190** | **266** | **195** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 0 | | 2 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **2** | **2** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **4.427** | **4.528** | **3.818** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald

| Vanligt virksemi | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 42 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | | 1 |
| | **0** | **0** | **42** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **0** | **0** | **42** |
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **4.427** | **4.528** | **3.860** |

## SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

| Vanligt virksemi | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 641 | | 580 |
| Tænastumenn | 586 | | 563 |
| Tímalønt | 45 | | 44 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 2 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 17 | | 23 |
| Eftirlønir | 78 | | 69 |
| **Lønir v.m.** | **1.368** | **1.400** | **1.278** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 9 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 64 | | 87 |
| Umboðan | 15 | | 1 |
| Orkukeyp - el | 3 | | 3 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 5 | | 5 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 1 | | 2 |
| Keyp av vørum annars | 34 | | 24 |
| Telefon | 24 | | 30 |
| Postgjøld | 6 | | 7 |
| Trygging | -1 | | 2 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 59 | | 56 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 96 | | 117 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **316** | **700** | **335** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 0 | | 7 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 8 | | 41 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **8** | **0** | **48** |
| Húsaleiga | 56 | | 56 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **56** | **100** | **56** |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | -1 |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **1.749** | **2.200** | **1.717** |

## SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN

| Kostnaður | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | | 28 |
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **28** |
| Tænastumannaeftirlønir | 2.383 | | 3.352 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **2.383** | **2.430** | **3.352** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **2.383** | **2.430** | **3.381** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Kostnaður | t.kr. 2003 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2002 |
|---|---|---|---|
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 0 | | 29 |
| Keyp av vørum annars | 0 | | 2 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 1 | | 12 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1** | **0** | **42** |
| Húsaleiga | 2 | | 0 |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **2** | **0** | **0** |
| Frádráttur fyri ferðakostnað | 0 | | -29 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **-29** |
| Bygningar, privat | 11.565 | | 21.547 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **11.565** | **14.000** | **21.547** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **11.567** | **14.000** | **21.561** |